DAGSINS MEINING

Øði valdast

Tað er ikki eiti á sum onkur oddagrein okkara hevur fingið øði í. Tað var ongantíð ætlanin. Atfinningar eru so ymiskar, og ymiskt er, hvussu fólk taka slíkar. Nú skulu vit ikki taka dagar ímillum, hvør loypir framav ella ikki, men SL stjórin skal hava takk fyri, at hann við klæðiligum lítillætni greiðir frá sínum virksemi.

Kalla okkum gamaldags, men munurin á einari eykajáttan, har alternativið er at leggja skip stilt, um játtanin ikki verður givin, og so at fara útum eina játtan, er ringur at fáa eyga á.

Politiski undirtónin í tí, vit skriva er, at vit halda, at ferðafólkaflutningur í Føroyum er ein almenn uppgáva, og tí er tað av alstórum týdningi at eventuellir bygnaðartrupulleikar verða umræddir. Konstruktiv umrøða má kunna fara fram uttan, at fólk fara í defensivin, sparka aftireftir og idealisera nútíðina. Strandferðslan hevur verið, er og fer vónandi framyvir at vera ryggásin í føroyskum ferðafólkaflutningi.

Tað áhugaverda er ikki, um ein leiðsla kann lastast fyri eitthvørt. Vit fokusera uppá bygnaðin í tí almenna, og har er adressan sólarklár. Ovasta ábyrgd tá tað kemur til bygnaðartrupulleikar liggur hjá løgmanni.

Vit dittaðu okkum at nevna rakstrarútreiðslurnar á SL. Rakstrarkostnaðurin av innanoyggjaflutninginum er á leið 40% hægri í dag enn í 1995. Strandferðlustjórin sendur okkum so eitt grannskoðaracitat, ið sigur at leiðslan hevur so onga ábyrgd av tí. Trupulleikin er ikki hvørs feilurin er, trupulleikin liggur í tí faktum, at raksturin er dýrari enn nakrantíð.

Tað hjálpir ikki, at man veit hvar hvør króna er farin, og hvørs feilur tað ikki er.

Trupulleikin liggur í skipanini, og óansæð hvussu góð fólkini eru, so verða tey ikki betur enn tann skipan tey virka í, so eingin grund er at taka kritikk av eini skipan persónliga og fara at brúka so sterk orð sum øði.

Man má ikki sovna av føgrum orðum hvussu gott og professionelt alt er í tí almennu skipanini í dag. Hvat sigur skattgjaldarin? SL stjórin sigur, symptomatiskt fyri umsitingarliga ættarliðið hjá sær, at "Politiski myndugleikin hevur ongantíð fyrr fingið nakað slíkt brúkiligt fakligt tilfar frá SL, sum grundarlag fyri at taka skilagóðar avgerðir um samferðsluna."

Niðurstøðan av omanfyristandandi má vera, at politikarnir í sjeytiárunum hava verið framúr dugnaligir, tá teir hava kunnað tikið skilagóðar avgerðir uttan "slíkt brúkiligt fakligt tilfar". Spurningurin er so hvørjar avgerðir fara at verða tiknar í dag, tá nú grundarlagið er so framúr gott, sum menn vilja vera við.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Skulu danir gerast fíggindar okkara?

Eilif Samuelsen
03-08-01

Endamálið hjá Høgna Hoydal er nærum rokkið. Viðurskiftini millum Føroyar og Danmark eru nú so eitrað, at eftir standa bert tær útpenslaðu fíggindamyndirnar, sum helst fara at gerast valplakatir.

Tað tykist at koma meira og meira til sjóndar, at eitt av strategisku endamálunum hjá fullveldisfólkunum hevur verið og framvegis er at forpesta viðurskiftini millum Føroyar og Danmark so nógv, sum til ber.

Hetta er lutvíst ein arvur, sum heilt frá þortun av tí gomlu sjálvstýrisrørsluni - gjøgnum Tjóðveldisflokkin, er geisaður upp aftur og settur í system av tí harða kjarnanum í fullveldisfylkingini seinastu trý árini.

Serliga tók útspillingin dik á seg, eftir at samráðingarnar við donsku stjórnina so fullkomuliga miseydnaðust orsakað av tí heilt veruleikafjara uppleggjunum, sum føroyska samráðingarnevndin í ung dommiligari hugmóð helt seg kunna smoyggja niður yvir donsku stjórnina uttan víðari. Tað kundi hon sjálvandi ikki. Og tann eyðmýkingin kravdi eina endurbót.

Strategiin hevur higartil eydnast væl. Tú møtir valla nøkrum fullveldisfólkum, sum hava nakað sum helst gott at bera Danmørk og dønum, og tey fylgja trúføst paroluni og gera sítt til at spilla Danmørk og alt danskt út. Danir fáa skyldina fyri alt tað ringa og negativa, sum eyga kann fáast á her á landi, bæði tað sum er, og ikki minst tað, sum ikki er.

Ein spurningur um trúgv
Henda systematiska útspillingin er nú í ferð við at koma inn í blóðið á øllum føroyingum. Royn og lurta eftir, hvussu fólk tosa, táið komið verður inn á politisku viðurskiftini millum Føroyar og Danmark. Lurta eftir, hvussu orðalagið og hugsunarhátturin hjá Høgna Hoydal hevur gjøgnumsúrgað hugaheimin, ikki minst hjá ungdóminum, ið sum vera man sjálvandi er lættastur at ávirka. Hansara flosklar og íðiliga endurtiknu rakstrarróp verða brúkt í staðin fyri argumentatión. Hesi fólkini eru langt síðani hildin uppat at hugsa sjálv. Nú trúgva tey. Sum um fullveldið var ein átrúnaður, og tá eru fólk um at koma hagar, Høgni vil hava tey.

Tað er høvuðsendamálið hjá øllum fólkaforførarum at fáa fólkið til at lata vera at hugsa sjálvt, men einans at trúgva upp á tey fáu rakstrarrópini, sum upp og upp í saman verða júkað niður í tey frá í erva: merkir bara, at ein verður myndigur. Evsta vald skal liggja hjá føroyska fólkinum. Yvirvaldsrætturin/ognarrætturin/ábyrgdin osfr. skal liggja hjá føroyska fólkinum. Vit skulu taka ábyrgd av egnum landi. Vit skulu taka ábyrgd av okkum sjálvum. Vilt tú hava, at føroyingar skulu hava evsta vald í Føroyum ella vilt tú, at danir skulu hava evsta vald? Hesi sitatini hjá Høgna Hoydal eru tann óhugnaligi kjarnin í fullveldispolitikkinum. Vit skulu bara trúgva upp á framtíðina, so fer alt samalt at laga seg. Avleiðingar skal ikki hugsast um. Henda grunna og hættisliga boðskapin eru nógvir føroyingar farnir at trúgva so fast uppá, at teir fara at atkvøða fyri fullveldinum, tí Høgni sigur tað.

Bønamenninir í garðinum
Upphavsmaðurin til fullveldisprosjektið ella –eksperimentið, sum tað í roynd og veru má metast at vera, hevur havt nógvar ídnar og eldhugaðar hjálparar. Eitt av hjálparamboðunum í fullveldistilgongdini er útgávan av vikublaðnum Fregnir, sum verður stýrt av tí kanska ágrýtnasta lærhvølpinum. Tað blaðið hevur meldað út, at tað er óheft av partapolitikki. Men ikki tess minni hevur tað nýtt allan sín mátt higartil at stuðla upp undir fullveldispolitikkin hjá landsstýrismanninum í sjálvstýrismálum, sum eisini er formaður í Tjóðveldisflokkinum.

Umframt ta integreraðu dananiðurgeringina hevur eitt av høvuðsevnunum í blaðnum verið at velja út úr toygt og tenjað tey og borðreitt tey betur enn nakað missiónsblað hevði dugað tað.

Tað er í fínasta lagi, at Dimma hevur loyst seg frá fyrst og fremst at vera málgagn hjá Sambandsflokkinum og til at vera óheft tíðindablað, sum rekur objektivan tíðindaflutning. Men tað er at fara eitt sindur ov langt í frísinnisins heilaga navni at lata blaðfólk sleppa at gera blaðið til eitt propagandablað fyri Tjóðveldis- og fullveldispolitikk. Og tað verður tað heldur ikki meira óheft av.

Nógv verður í hesum døgum talað um telduvirus, sum kann gjøgnumsúrgað telduheilan. Nakað tað sama er hent í føroyska samfelagnum, síðani henda samgongan kom til við einans einum endamáli. Fullveldisvirusið hevur, uttan at vit rættiliga hava givið tí gætur, gjøgnumsúrgað føroysku tilvitanina.

Men í flestu førum ber til at finna eitt antivirus, sum kann basa slíkum. Og skulu vit trúgva buldribassanum í skjalarúgvu fingin til vega úr donskum ráðharrastovum. Vald eru bert tey skjølini, sum seta viðurskiftini til Danmørk í ringt ljós. Haraftrat vera skjølini grovliga misbrúkt, við tað at blaðið letur skína ígjøgnum, at hetta er søguligi sannleikin um viðurskiftini beint eftir kríggið. Skjølunum er sjálvandi einki í vegin við, men tey høvdu uppiborið at verið viðgjørd av heiðurligum søgufrøðingum, sum ikki misbrúktu tey at manipulera við.

Dimma sum propagandablað
Sjálvt inni á gomlu Dimmu hevur seinastu trý árini verið ein vælskrivandi tegnur, viðhvørt fleiri, sum hava loftað hvørjum orði av munni andaliga leiðarans, seinasta Fregni, so er vón í eygsjón.

Sjálvt um tað skuldi hent einaferð í framtíðini, at vit loystu okkum meira frá Danmark, so hevði tað tænt okkum sjálvum, ættarfólki okkara har niðri og føroysku tjóðini munandi betur, at vit høvdu varðveitt tey virðiligu, góðu og brøðraligu viðurskiftini, sum teir allarflestu føroyingarnir ígjøgnum øldir hava mett sum eina sjálvfylgju.

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Tíðindaleiðari:
Justinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Myndamenn:
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Sosialurin í Norðoyggjum:
Postmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

VIÐMERKINGAR

Nú er meiriluti fyri samhaldsføstu eftirlønarskipanini

Hans Pauli Strøm
løgtingsmaður fyri Javnaðarflokkin

Alt bendir nú á, at ein stórur meiriluti í Løgtinginum við Javnaðarflokkinum, Sambands-flokkinum, Miðflokkinum og Tjóðveldisflokkinum er heldur fyri at byggja á samhaldsføstu eftirlønarskipanina enn ta privatu fólkatryggingina hjá Fólkaflokkinum og Sjálvstýrisflokkinum.

Eitt av teim størstu politisku málunum seinastu árini er tørvurin á eini eftirlønarskipan fyri arbeiðsmarknaðin. Landsstýrið boðaði beinanvegin frá, so skjótt tað varð skipað í mai 1998, at tað fór at koma við eini privatari tryggingarskipan, nakað sum Fólkaflokkurin hevði skotið upp í valstríðnum.

Nógv tjak hevur hesi 3-4 árini staðið um hetta málið. Javnaðarflokkurin hevur nýtt eitthvørt høvi at stríðst móti hesi fólkaflokstryggingini, og hevur ístaðin víst á Samhaldsfasta Eftirlønargrunnin sum ta bestu og mest rættvísu skipanina. Hetta hevur eisini verið støðan hjá føroysku fakfelagsrørsluni.

Sannleikans tími nærkast
Landsstýrið hevur ferð eftir ferð boðað frá, at nú fór uppskotið at koma. Men onki hevur spurst burturúr. Men nú tykist sannleikans tími at nærkast. Smb. Dagblaðnum hevur løgmaður sligið nevan í borðið og kravt, at nú skal uppskotið fram við fólkafloksligu fólkatryggingini, ella tók hann málið úr hondunum á Sámal Peturi. Undir viðgerðini av ólavsøkurøðu løgmans hevur so Sámal Petur svarað, at nú kemur tað fyrsta dagin - ”uppskotið til lógartekstin er skrivað”, sigur hann

Nú er so tann stóri spurningurin, hvussu uppskotið er, ið landsstýrismaðurin ætlar at leggja fram. Enn noktar hann at siga nakað um tað. Men tó er alt, sum bendir á, at tað er tann fólkafloksliga privata tryggingarskipanin, sum tað verður borðreitt við. Hetta segði lstm. Bjarni Djurholm longu á aðalfundi í Føroya Arbeiðarafelag t. 9.3.2001, har umboð fyri flokkarnar vóru bodnir at greiða frá teirra sjónarmiðum um arbeiðsmarknaðareftirlønina.

Tann fólkafloksliga fólkatryggingin
Landsstýrismaðurin segði frá,

- at hetta fór at verða ein tvungin privat og individuel trygging, skipað sum lívrentu ratutrygging,
- at inngjaldið frá øllum løntakarum skuldi økjast líðandi úr 2% upp í 8-10%, byrjandi longu nú í heyst,
- at útgjaldið fór at verða alt eftir, hvussu nógv hvør einstakur hevði goldið inn, men
- onki útgjald fer at vera, fyrr enn aftaná fult uppsparingarskeið hjá hvørjum einstakum.

Er hetta veruliga ætlanin hjá landsstýrinum, so hevur landsstýrið ein stóran trupulleika, tí tann størsti samgonguflokkurin tekur ikki undir við hesi fólkaflokstryggingini. Tað segði umboð Tjóðveldisfloksins longu á sama fundi í F.A. Teir vildu heldur hava eina samhaldsfasta skipan á ein ella annan hátt. Og hetta hava fleiri umboð fyri Tjóðveldisflokkin tikið uppaftur nú undir viðgerðini av løgmansrøðuni.

Fólkaflokstryggingin kolldømd av løntakarafeløgunum
Men vit eru so von við, at tá tað kemur til skarpskeringar, so bognar Tjóðveldisflokkurin undir trýstinum frá Fólkaflokkinum. Tó fái eg meg ikki at trúgva, at hann eisini hesaferð gevur seg undir koyrilin, tí tað verður ikki lukkuligt fyri flokkin, um hann letur fólkaflokstryggingina blíva úrslitið av stríðnum um komandi eftirlønarskipanina fyri arbeiðsmarknaðin. Ein slík skipan er frammanundan kolldømd av øllum løntakarafeløgunum. Tey fara aldrin við góðum at finna seg í, at landsstýri og løgting fara at kroysta slíka eftirlønarskipan niður yvir høvdið á teimum – ikki minst tá hugsað verður um hvussu væl løgting og landsstýri hava syrgt fyri egnum pensjónum.

Torir landsstýrið at slongja hetta uppskotið í skonina á arbeiðandi fólkinum í Føroyum? Eg vóni tað ikki, og vil tí í staðin mæla landsstýrinum til: Takið stig til at fáa semju um eina eftirlønarskipan við løntakarafeløgini og við alt løgtingið. Leggið hetta málið til viðgerðar í serliga tingnevnd, mannað úr øllum flokkum.

Bæði Sambandið og Tjóðveldi eru nú við uppá Samhaldsfasta
Javnaðarflokkurin er hinvegin ikki í iva um, at tann besta og mest rættvísa loysnin viðv. arbeiðsmarknaðareftirlønini er at satsa uppá tann samhaldsfasta. Hetta er eisini tann loysnin, sum fakfeløgini vísa á.

Gleðiligt er, at Tjóðveldisflokkurin nú er sinnaður at venda aftur til samhaldsføstu loysnina, sum hann var við til at seta í verk fyri meir enn 10 árum síðani.

Og gleðiligt er eisini, at Sambandsflokkurin hevur skift hugsan og nú eisini tekur undir við Samhaldsfasta, og beinleiðis er komin við uppskoti um at skjóta 400 mió. kr. í stovnsfæið nú og aftur 400 mió. kr. seinni. Ikki minst var tað hetta, sum aftur fekk Samhaldsfasta ovast á politisku dagskránna.

Roknidømi uppá Samhaldsfasta
Um vit nú bara rokna við hesum fyrstu 400 mió. kr. og økja stovnsfæið hjá Samhaldsfasta við tí, so skuldi tað kunna givið eitt árligt avkast uppá 20-25 mió. kr. Tað er líka nógv sum árliga inngjaldið nú, og skuldi tað tí kunna økt mánaðarliga útgjaldið til tað dupulta, úr 600 til 1200 kr.

Hetta er sjálvandi ikki nóg mikið. Vit kunnu tí skjóta upp, at inngjaldið til Samhaldsfasta eisini verður økt úr núverandi 0,5% til 2% - og verður verandi har. Tað skuldi beinanvegin kunna givið eina hækking uppá 1600 kr. um mánaðin.

Samanlagt kundu vit á henda hátt økt mánaðarliga útgjaldið til hvønn einstaknan borgara yvir 66 ár beinanvegin til 1200 + 1600 kr. um mánaðin, tils. 2.800 kr. Við rentutilskriving kundi hetta verið 3.700 kr. longu eftir 5 árum, og 4.800 eftir 10 árum.

Samhaldsfasti og fólkapensjónin tilsamans
Taka vit nú fólkapensjónina saman við tí økta útgjaldinum úr Samhaldsfasta, so kunnu upphæddirnar verða:

Fyri stakan pensjonist:

Nú:	9.000 kr.
Um 5 ár:	10.000 kr.
Um 10 ár:	11.000 kr.

Fyri pensjonistahjún:

Nú:	15.000 kr.
Um 5 ár:	17.000 kr.
Um 10 ár:	19.000 kr.

Við hesum kunnu vit siga, at vit hava eina sømiliga grundpensjón til øll. So kunnu løntakararnir gjøgnum síni fakfeløg hava aðrar eftirlønaruppsparingar, so sum tey halda seg hava møguleika og tørv fyri.

Nú eru hesi tølini bara eitt roknidømi út frá leysligum metingum. Upphæddirnar kunnu sjálvandi verða heilt aðrar, tí til ber jú at broyta allar hesar tríggjar tættirnar: bæði stovnsfæið í Samhaldsfasta, prosentinngjaldið í Samhaldsfasta, og upphæddirnar í fólkapensjónini. Avgerandi fyri úrslitið er, hvussu langt politiski viljin røkkur.

Landsstýrismannaeftirlønin og arbeiðsmarknaðareftirlønin
Javnaðarflokkurin fegnast um, at undirtøkan fyri Samhaldsfasta er styrkt so nógv í seinastuni, at nú skuldi borið til at gera hann til tað munagóða ískoytið til pensjónina, sum ætlanin upprunaliga var.

Samstundis hevur Javnaðarflokkurin eisini avgjørt, at vit fara saman við øðrum flokkum at taka stig til, at samtyktu broytingarnar av eftirlønum landsstýrismanna verða settar úr gildi, og at málið fær nýggja viðgerð - men ikki fyrr enn spurningurin um eina eftirlønarskipan fyri arbeiðsmarknaðin er avgreiddur.

Sosialurin í øðini inn á SL

Reidar Nónfjall
stjóri

SL fara at gera hesar viðmerkingar til oddagreinina í Sosialinum leygardagin 4. august 2001, um roknskapin fyri 2000 hjá SL.

Ja, so kom SL aftur í oddagreinina hjá Sosialinum og við sama áleypandi politiska undirtónanum - hetta í sambandi við roknskapin fyri 2000.

Sosialurin er provokeraður av, at SL hevur hildið játtanina fyri 2000, við teimum fortreytum, sum stovnurin nú einaferð hevur at virka undir. Evnið sýnist at vera, at almennir stovnar gerast meira og meira ineffektivir og víst verður á, at SL hava hægri útreiðslur til umsiting.

Tað er týðuligt, at skrivarin ikki hevur gjørt nakra roynd at analysera roknskapin hjá SL og tí hevur annað endamál við skrivingini. Til tína kunning, sum skrivar, so framgongur m.a. av roknskapinum fyri 2000, at lønir til umsitingina hjá SL hava staðið í stað seinastu 5 árini. Hetta er hent samstundis sum ein frágreiðing fyri og onnur eftir kemur frá SL um nýskipan av virksseminum. Politiski myndugleikin hevur ongantíð fyrr fingið nakað slíkt brúkiligt fakligt tilfar frá SL, sum grundarlag fyri at taka skilagóðar avgerðir um samferðsluna. So er tað sagt.

Tað var tann tíðin, tá fíggjarætlanin hjá SL fylti eina A4-síðu og bygnaðurin hevði við sær kaos og ábyrgdarloysi. Nú inniheldur fíggjarætlanin hjá SL yvirlit av øllum slag og nógvar frágreiðingar um, hvat peningurin hjá skattaborgaranum verður brúktur til. Avleiðingin av hesum er, at SL í dag hevur stórt gjøgnumskygni í rakstrinum – hetta var beint øvut fyri bara 5 árum síðani.

SL tulka politiska kravið um flutningstænastu soleiðis, at SL skal veita eina støðuga tænastu og við tíðini hægri tænastu. Hækkaða játtanin í 2000 til SL hevur onki sum helst við nakran skeivan bygnað og hægri útreiðslur til umsiting hjá SL at gera, men handlar um hægri framleiðslukostna í mun til politiska kravið um støðuga tænastu og uppá sikt hægri tænastu. Sjálvt um siglt og koyrt verður meira, er inntøkugrundarlagið avmarkað og prísirnir politiskt góðkendir og tí oftast størri hall.

Tað er hóskandi at enda hesar viðmerkingar við einum citati úr niðurstøðuni í grannskoðanarfrágreiðingini fyri ársroknskapin 2000 hjá SL: ” Tað er fatanin hjá grannskoðanini, at leiðslan alla tíðina hevur tak á fíggjarligu støðuni, hóast neyðugt hevur verið við eykajáttanum orsakað av, at rakstrarætlanin fyri 2000 ikki hevur hildið. Økt virksemi og harvið øktar lønarútreiðslur og nógv hækkaðu oljuprísirnir eru høvuðsorsøkirnar. Grannskoðaðin metir ikki, at leiðslan kann lastast fyri meirnýtslluna, tá ið henda ikki hevur møguleika at tillaga virksemi eftir fíggjarligu orkuni.”